# Heimatænastan í VEKS - Corona tilbúgving

**Tilbúgving**
Settur er ein tilbúgvingarbólkur at skipað virksemi á teimum 3 heimunum, umframt úti í Heimahjálpini og í Heimasjúkrarøktini.

**Vaktarbólkar**
Arbeitt verður við at skipa vaktirnar inni á heimunum og úti í Heimahjálpini og Heimasjúkrarøktini soleiðis, at somu starvsfólk í mesta mun arbeiða saman, og passa somu borgarar. Málið er, at amvarka smittuvandan ímillum starvsfólkabólkar sínamillum, og búfólk sínamillum so nógv sum tilber.

**Avvarðandi**
Arbeitt verður við at kanna, í hvønn mun avvarðandi kunnu átaka sær uppgávur, sum ídag verða veittar av heimahjálpini. Hettar fyri at avmarka tal av vitjanum heima hjá einstaka borgaranum, og harvið avmarka smittuvandan.

**Vitjanir**
Vit seta forboð fyri vitjanum til borgarar á Korndalsbýlinum, Mørkini og á Grønanesi. Serstøður skulu avtalast við ávikavist Helfrid Poulsen, Korndalsbýlið, Jonu Dam, Mørkin og Miu Pedersen, Grønanes.

**Fyribyrgjandi venjingar**
Fyribyrgjandi venjingarnar á Eiði, Streymnesi, Kvívík og í Vestmanna verða avlýstar fyribils. Nærri fráboðan kemur, tá venjingarnar verða tiknar uppaftur.

**Áheitan**

*Tað verður inniliga heitt á starvsfólk, avvarandi og borgarar annars, um at vera **sera umhugsin** í samband við tað dagliga atferðar- og ferðamynstri viðvíkjandi okkara eldru borgarum soleiðis, at vit øll – í tann mun tað liggur í okkara makt – ikki gerast smittukeldur, men kunnu varveita virkisførleikan, og harvið kunnu verða um okkara eldru borgarar, bæði inni á heimunum, og heima hjá tí einstaka borgaranum.*

*Lat okkum í felag Samskifta, Samstarva og Samskipa, soleiðis at vit standa saman um at halda frástøðu í tann mun tað letur seg gera, fyri at forða fyri útbreiðslu av corona smittuni.*

**Heimatænastan í VEKS**